

# Oljuprísurin eitt vet upp í morgun, men marknaðurin er ófriðarligur

**Jógvan Hugo Gardar**

09.07.2015 - 07:50

Oljan.fo

Í morgun fór prísurin á norðsjóvaroljuni upp við 0,75 prosent, og kostar nú 57,65 dollarar fyri fatið. Eisini prísurin á amerikansku lættoljuni WTI er farin upp í morgun við umleið einum prosenti, til 52,30 dollarar fyri fatið.

Hendan vikan hevur verið krevjandi fyri oljuídnavin, og Brent kostar í dag 3,76 prosent minni enn um vikuskiftið. Amerikanska WTI-oljan kostar í dag 5,92 prosent minni enn um vikuskiftið.

Tað er fíggjarligi ófriðurin í Kina og í Evrulondunum , umframt samráðingarnar um eina kjarnorkuavtalu við Iran, sum gera at prísurin lækkar. Rokna verður við at oljuprísurin kemur at lækka enn meir, um semja verður við Iran.